TING-HELLAN

# Men Ísrael, tað ber væl til at vera eitt fólkaræði og yvirgangsland um somu tíð



MIÐEYSTUR
*Agga Niclasen*
*aniclasen@yahoo.com*

**Fyri at goyma slíkt frumkent siðloysi, hevur Ísrael so sera sniðfundigt fostrað eina offurímynd. At øsa fram ella birta í harðskap, tú síðani hevur skyldu til at verja teg ímóti, er jú sjálvur aðaltátturin í offur-mentalitetinum**

So fyri at goyma slíkt frumkent siðloysi, hevur Ísrael so sera sniðfundigt fostrað eina offurímynd. At øsa fram ella birta í harðskap, tú síðani hevur skyldu til at verja teg ímóti, er jú sjálvur aðaltátturin í offurmentalitetinum. Og við at vissa sær, at hetta ongantíð verður gloymt, við at ævinliggera slíka vanlukkuliga ringrás, er Ísrael nú eitt yvirgangsland sum einki annað.

Tey, sum skilliga ynskja at fjala ísraelska siðloysið, plaga vanliga at avmarka alt óhugaligt prát um ísraelska lyndið við bert at tosa um ræðuleikarnar aftaná hertøkuna í 1967 og víðgitnu "tvey-landa loysnuna". Hetta, av tí at undir eini viðurkennan av einum palestinskum státi býr ein viðurkennan av einum ísraelskum einum.

Men sjálv "skapanin" av Ísrael kravdi eina yvirgangsgerð, ið vesturheimurin við Ísrael á odda, sjálvandi, so hentliga hevur "gloymt". Í 1948, og ikki so langt aftaná nasistanna reinsan av jødum, var bróðurparturin av teim ikki-jødisku upprunabúgvunum fyri eini etniskari reinsan frá tí parti av Palestina, seinni nevndur Ísrael. Henda gerð varð nákvæmsliga løgd til rættis. Uttan hana, eingin státur við einum jødiskum meiriluta og eyðkenni. Uttan hana, einki Ísrael.

Síðani 1948 hava "ísraelskir arábarir"—palestinar, sum smoygdu sær undan útblakanini—upplivað áhaldandi mismun. Nógvir hava verið trokaðir burtur innanlands, av tí ið sæð verður vegna "trygdarávum", men í veruleikanum fyri at útvega sær teirra land til jødar.

Eg beri einki agg til Ísrael, slettis ikki, men sjálvt nakað so ræðuligt sum nasistanna hópmorð av jødum og tráanin eftir einum jødiskum savningarstaði kann nakrantíð rættvísgera etniska reinsan og hevdan á aðrari rasu. Tað er ikki óvant at halda uppá, at tað er fullkomiligani lívsneyðugt hjá ísraelsbúgvum at søkja trupulleikar, at birta í harðskap, fyri á henda hátt hava ein felags útvortis fígginda at savna seg um og soleiðis, við einum annars lemjandi innvortis úrsliti, sleppa undan at hyggja at sær sjálvum.

Robert Fisk, til dømis, frágera góði blaðmaðurin hjá álvarablaðnum The Independent, plagar afturvendandi at taka nakað soleiðis til í hansara frásagnarligu tulkingum: "Við tí fyri eyga at sleppa undan hóttandi ótryggleika heima við hús, hvat ein etisk kanning hevði havt til úrslit, má Ísrael allatíðina føða ein kraftagóðan offur-mentalitet ímillum ísraelskar jødar í vónini at fjala tann innasta trupulleikan" (:so nøkulunda endurgivið!).

At uppihalda handa hugan, handa mentalitetin, og at varðveita ta áskoðan ímillum uttanfyristandandi, at tað er tað eginliga offrið, má Ísrael fostra upp umstøður fyri harðskapi. Og altíð tá ið útlitini fyri harðskapi søkka til botns, má Ísrael gera sítt ítasta fyri at endurføða tey.

Úrslitagóða átakið hjá Ísrael at blaka hesar rámandi atfinningar um landsins byrjandi og samfasta burturrekstur av upprunaligu palestinunum á bláman, gevur teim síðstnevndu einki annað í at velja enn júst at taka til harðskap; og tá er tað at vanlukkuliga støðan, ið hevur valdað í Palestina í so nógv áratíggju, ikki endar, men gongur í ring.

Í kjalarvørrinum á at Hamas—einasti flokkurin, sambært palestinum, ið ikki enn hevur givið skarvin yvir—tók við stjórnarvaldinum í Palestina, hava palestinsku íbúgvarnir í Gasa og á Vestara Áarbakka verið fyri einum ísraelskum hungurs- og eyðmýkingarátaki væl kryddað við harðskapi.

Falska "afturtøkan" úr Gasa, og eftirfylgjandi blokadan, hevur einans veitt vissu fyri varandi harðskapi, sum higartil kann vísa á eitt palestinskt rakettálop, fangatøkuna av tveimum ísraelskum hermonnum og nakað, ið nú mest líkist eini endurhertøku av Gasa. Vit eru tístaðni vitni til meira hatur, meira harðskap frá palestinum og stuðlum, meira eyðmýking, meira kollektiva revsing frá ísraelittum og stuðlum—alt samalt so sera gagnligt fyri ísraelska offur-mentalitetin og handa heilag kúgv-standin, ísraelskur borgaraskapur nýtur so gott av.

Sannleikin er hesin, og vil hesin altíð vera ein torførur ein at svølgja hjá serstakliga ísraelsvinum, ið oftani tykjast uppaftur meira víðgongdir enn víðgongdir ísraelittar at vera í síni treytaleysari verju av hasum "heilaga" landinum: at sundurlimanin av Palestina hevði ongantíð verið til, hevði hon skulað verið á etiskt góðtakiligan hátt. Ísrael kom til við yvirgangi og hevur tørv á yvirgangi so at myrkaleggja landsins innara siðloysi.

Tað vísir seg... hvørja ferð tað er ein tinna av støðugleika, gevur ísraelska leiðslan boð um eina sonevnda "targeted assassination", sum handa í Sidon, ið faktiskt var frammanundan nýligu kreppuna í Libanon. Altso, avrættingin í Sidon av onkrum "undir illgruna fyri" at hava gjørt seg inn á Ísrael hendi áðrenn fangatøkuna av teimum báðum ísraelsku soldátunum, sum so aftur setti stríðsóða Ísrael í gongd væl vitandi, at hetta hevur við sær, ikki tryggleika, men meira harðskap. Ísraelska eingongan og harðskapsins kringla føða hvør aðra.

Sum rakettir verða sendar frá og ímóti Ísrael hava vit skyldu til, mitt í øllum yvirganginum og óndskapinum, at tala at. Vit hava skyldu til at tala at henni higartil so úrslitagóðu royndini hjá Ísrael at fjala landsins innara siðloysi, avdúka offur-mentalitetin og yvirhøvur strika handa heilag kúgv-standin, landið hevur notið so gott av. Tey, ið tiga, ið lata vera við at taka støðu, ið sópa veruleikan um Ísrael inn undir teppið, gera seg samsek í at fostra upp umstøður fyri einum yvirgangi, sum um síðir saktans kann tæga verðina sundur.



Sum tess íbúgvar verða dripnir, leggur Ísrael enn einaferð deyða og sorl á Libanon. Jú, jú, tað roynir at lýsa henda ræðuleika verandi ein ósundurskiljandi partur av landsins sjálvverju. Og, vissuliga, at síggja til tykjast rakettálopini á ísraelskar býir at heimila hasa hevdanina.

Sjálvandi eiga lond at verja "sínar" íbúgvar; lond, ið ikki gera tað, gera ikki sína skyldu og áttu at verið sett saman av nýggjum. Men Ísrael er eitt land sum, ístaðin fyri at verja ísraelittar, setur allar teirra—jødar eins væl og ikki-jødar—í vanda.

Hvat verður í grundini vart við harðskapinum í Gasa og Libanon? Eru tað ísraelsbúgvar ella tað, ið "ger" hin ísraelska státin? Eg skjóti upp, at tað er tað seinna av hesum; at tað er sjálvt landið, tað, ið ger tað, ið verður vart.

Ísraelska tjóðin er grundað á eina órætta ideologi, sum orsakar manminkan og líðing fyri hasi, ið eru flokkað sum ikki-jødar annaðhvørt sambært eini átrúnaðarligari ella tjóðfrøðiligari roynd. Ísraelittar eru væl vitandi um henda sannleika; og eru líkaleiðis væl vitandi um, at hesin ikki kann vera annað enn ein beiskur biti at slúka hjá øðrum londum og rasum. Ein sannleiki, sjálvt Sambandsríkið Amerika hevði hildið verið etiskt ógóðtakiligan, og sum tí má myrkaleggjast.